# VILT TÚ VERÐA NÆMINGUR HJÁ OKKUM?



Tak eina avbjóðandi og fjølbroytta útbúgving í Tryggingarfelagnum Føroyum. Vit leita eftir hugagóðum og dugnaligum næmingum, sum tora at taka ábyrgd og vilja hava ávirkan.

Vit sóknast eftir næmingum, ið tora at ganga á odda og eru fúsir at vera partur av eini fyritøku, sum í fullari ferð stevnir ímóti avbjóðingum á altjóða støði. Tryggingarfelagið Føroyar er nýhugsandi, framsøkið og høgt í metum. Hevur tú árræði, kanst tú vera við til at mynda felagið.

Fíggjarútbúgvingin er ein tvey ára útbúgving, sum fevnir um ein praktiskan og ein teoretiskan part. Fíggjarútbúgvingin gevur tær góðar starvsmøguleikar innan tryggingar- og bankaverðina. Sum næmingur í Tryggingarfelagnum Føroyumført tú ein hollan kunnleika um tryggingar og lærir millum annað um løgfrøðina aftanfyri. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum tryggingarøkjum, og soleiðis ført tú innlit í fjøltáttaða arbeiðið í eini stórari fyritøku við 120 starvsfólkum.

Tú ført teoretiskan førleika gjøgnum undirvísing og uppgávur, sum skulu gerast við jøvnum millumbilum. Útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera. Næmingatíðin mennir teg og tínar førleikar og er eitt avgerandi stig á tíni yrkisleið. Tú verður ein partur av einum toymi við sera dugnaligum starvsfeløgum og ført møguleika at ávirka og seta dám á tína deild.

Á www.trygging.fo kanst tú lesa meira um Tryggingarfelagið Føroyar og okkara virksemi. Vilt tú vita meira, ert tú eisini vælkomin at ringja til Starvsfólkadeildina á tel 345600 ella skriva til starvsfolkadeild@trygging.fo

Tað er ein treyt, at tú hevur studentsprógv, HF, HH ella líknandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. juni 2007. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella fyllast út á www.trygging.fo

sansir.fo

Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 120 fólk.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

---

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*

# Starvslesandi í Vinnuhúsinum

Við hesum verður søkt eftir starvslesandi til Vinnuhúsið seinna hálvár 2007. Lesandi kunnu søkja um at koma í starvsvenjing, um tey t.d. hava áhuga í at kunna seg um ávíst vinnuøki í samband við lestrarupp-gávu ella í samband við teirra lestrarøki sum heild.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi fær eina høvuðsupp-gávu at loysa, sum er tengd at fakligu bakgrundini hjá viðkomandi og tørvinum hjá Vinnuhúsinum. Dømi um eina tílíka uppgávu er at gera kunningartilfar til heimasíðuna, kanna marknaðir, skriva frágreiðing um altjóða rák, gera greiningar av eini vinnugrein ella líknandi. Harafturat kemur tann starvslesandi luttaka í dagliga arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi við hægri háskúla og skal í minsta lagi hava lokið útbúgving á bachelor stigi.

Tey, ið søkja, eiga at hava góð samstarvs-evni, vera ágrýtin, miðvís, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga umframt hetta at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir somu reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi hjá tí almenna og er ólønt. Viðbót verður tó latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan Mortensen ella Maritu Rasmussen, tlf. 309900. Meira kunning um Vinnuhúsið er at finna á www.industry.fo

Umsókn við prógvum og/ella avriti av úrslitum higartil skal sendast til:

Vinnuhúsið
Postboks 1038,
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til: industry@industry.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni 2007.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 15 vinnufeløgum. Í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arb-eiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Feløgini taka sær av sátt-málum á privata arbeiðsmark-naðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn
Tel 30 99 00, Fax 30 99 01
industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo